# Vit vilja minnast okkara deyðu børn

**- Familjan er ikki altíð tann besta at veita tann rætta uggan, tá ið tú hevur mist eitt barn. Trupulleikin verður gjørdur lítil, men fyri mammuna er hann ógvuliga stórur, sigur Annvør Nielsen frá felagnum Pinkubarnadeyði, sum skipar fyri minningarhaldi sunnudagin**

MINNINGARDAGUR
*Turið Kjølbro*

- Tá ið vit missa eitt barn, missa vit ein part av okkum sjálvum. Ein part av okkara framtíð, og ein part av okkara samleika. Vit náddu at knýta sterk bond til børn okkara, annaðhvørt tey vóru fødd ov tíðliga, til tíðina, ella vit hava livað saman við teimum, sigur Annvør Nielsen, frá felagnum Pinkubarnadeyði.

Síðani 1997 hevur felagið Pinkubarnadeyði skipað fyri minningarhaldi fyri deyð børn Alla Halganna Sunnudag, tá ið vit eisini minnast tey, sum eru farin á sjónum.

Í felagnum Pinkubarnadeyði koma foreldur, sum hava mist børn, saman annan leygardag í hvørjum mánaði.

- Tá ið tú sjálv hevur mist eitt barn, veitst tú, at tørvur er at koma saman við øðrum, sum eru í somu støðu. Vit tosa saman og lurta eftir hvør øðrum. Eingin okkara er professiónellur, men vit vita kortini, hvat tað snýr seg um. Familjan er ikki altíð tann besta at veita tann rætta uggan, tá ið tú hevur mist. Mangan roynir familjan at fáa mammuna at gloyma barnið, sum hon hevur mist, men hetta hjálpir als ikki. Trupulleikin verður gjørdur lítil, men fyri mammuna er hann ógvuliga stórur, sigur Annvør Nielsen.

Tað er misjavnt, hvussu nógv fólk vitja í felagnum.

- Felagið er upprunaliga ætlað teimum, sum missa pinkubørn, men her koma eisini onnur, sum missa børn í 20. viku. Eisini koma onnur, sum hava mist børn í ferðsluni. Summi koma tvær-tríggjar ferðir, meðan onnur koma í fleiri ár í felagið, sigur Annvør Nielsen. Sjálv misti hon eitt barn í 1995.

- Sjálv havi eg arbeitt meg burtur úr sorgini, men føli kortini, at eg havi brúk fyri at vera við í felagnum, um enn ikki so ofta longur. Vit eru eini átta fólk, sum skiftast um at taka okkum av virkseminum í felagnum leygardagar, greiðir Annvør Nielsen frá.

Nakrar ferðir um árið verður skipað fyri tiltøkum, har fólk uttanifrá koma at greiða frá ymiskum, ið hevur við pinkubarnadeyða at gera.

Minningarhaldið verður í Dómkirkjuni sunnudagin kl. 16.00. Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, prædikar. Petra Iversen luttekur við sangi. Minningarhaldið verður sum ein vanlig gudstænasta við altargongd. Tað verður møguleiki hjá teimum, sum hava hug til tess, at tendra eitt ljós, fyri tí barni, ið farið er og fyri at vísa kærleika, ið ongantíð verður gloymdur.

- Hetta er ein hátíðarlig og hugnalig løta, ikki at samanbera við eina jarðaferð, sigur Annvør Nielsen.

Í fleiri ár hevur verið skipað fyri líknandi minningarhaldum í Svøríki og Danmark, og seinastu fýra árini hava føroyingar tikið táttin upp.

- Undirtøkan hevur verið so góð, at vit hava valt at gera minningarhaldið sum ein vakran og afturvendandi sið, har øll kunnu minnast teirra deyðu - uttan mun nær og hvørjum sambandi viðkomandi er farin. Saman við børnunum í familjuni, tey sum vóru og tey sum eru komin, minnast vit tey deyðu børnini, sigur Annvørn Nielsen at enda.



*- Tá ið tú sjálv hevur mist eitt barn, veitst tú, at tørvur er at koma saman við øðrum, sum eru í somu støðu, sigur Annvør Nielsen frá felagnum Pinkubarnadeyði*
Mynd: Jens Kristian Vang

**Tíðindi uttan úr heimi**

## Styðja forsetan, men óttast fleiri atsóknir

**53 prosent av amerikanarunum vænta fleiri yvirgangsatsóknir í USA**



Ein nýggj meiningakanning í USA vísir, at amerikanska fólkið tekur fult undir við politikkinum hjá George W. Bush, forseta í stríðnum ímóti altjóða yvirganginum. Sambært kanningini styðja 87 prosent forsetan og politikk hansara.

Men kanningin avdúkar samstundis, at alt fleiri og fleiri amerikanarar ivast í, at tað fer at eydnast amerikanska herinum at beina fyri Osama bin Laden. 25 prosent siga seg vænta, at herurin verður førur fyri at beina fyri bin Laden. Í einari kanning fyri trimum vikum síðani svaraðu 30 prosent tað sama.

Tann nýggja kanningin vísir eisini, at amerikanarar stúra fyri fleiri yvirgangsatsóknum. 53 prosent vænta fleiri atsóknir.

Kanningin avdúkar eisini, at nógvir amerikanarar hava mist álitið á, at stjórnin er før fyri at verja tey ímóti yvirgangi. Um mánaðarskiftið september-oktober søgdu 35 prosent seg hava álit á, at stjórnin kundi verja tey. Í dag eru tað bara 18 prosent, sum seta sítt álit á Bush og stjórn hansara.

**(fartekst)**

# Milosevic ikki at vika

**Fyrrverandi jugoslaviski forsetin sýtir framvegis fyri at viðurkenna altjíða krígsbrotsmannadómstólin í Haag og vísir øllum ákærum aftur**

Tríggjar ferðir hevur Milosevic nú staðið andlit til andlits við dómararnar í Haag. Seinast mánadagin, tá hann enn einaferð vísti, at hann hevur ikki minstu virðing fyri dómstólinum, og at hann hevur uppaftur minni virðing fyri teimum drúgvu ákæruritunum, sum ákæruvaldið við Carlu del Ponte á odda leggur fram.

- Sannleikin druknar ikki kortini í hesari flóðalduni av ósannindum og falsaðum ákærum, segði hann í einari stuttari viðmerking, tá hann hevði hoyrt tær nýggju ákæruenar, sum vórðu lagdar fyri hann á rættarfundinum mánadagin.

Milosevic sat óstillur í stólinum, meðan ákærin las ákæruritið.

- Harra Milosevic. Játta tygum, at tygum eru sekur í ákæruni, spurdi rættarformaðurin, Richard May.

- Innihaldið í ákæruni er falsað, svaraði Milosevic.

Uttan at nevna Afghanistan við navni samanbar Milosevic amerikansku álopini har við tað, sum hann sjálvur gjørdi.

- Eg vardi Serbia ímóti yvirgangsmonnum, segði Milosevic.

Longu í næstu viku skal hann aftur í rættarhølið. Tá fer ákærin at kunna hann um, at hann er ákærdur fyri krígsbrotsverk og fólkamorð í krígnum í Bosnia-Herzegovina í árunum frá 1992 til 1995.

Rætturin fylgir reglunum. Milosevic fylgir sínum reglum.

**(Fartekst)**

# Flogfar mátti neyðlenda eftir hóttan um atsókn

**Ferðafólk fann lepa við boðum, ið bendu á yvirgangsatsókn.**

Eitt ferðamannaflogfar hjá amerikanska flogfelagnum American Airlines, sum var á veg úr New York til Dallas, fekk boð um at broyta kós og at neyðlenda í Washington mánakvøldið.

Í floghavnini vórðu øll flogfør beind av vegnum, og vápnaðir trygdarmenn stóðu á varðhaldi allastaðni kring floghavnina. Tá flogfarið hevði sett seg, vórðu tey 141 fólkini koyrd úr flogfarinum beinanvegin, og kanningarlið vórðu send at kanna flogfarið.

Sambært loftferðslumyndugleikunum fekk flogfarið boð um at neyðlenda, tí eitt av ferðafólkunum hevði funnið ein pappírslepa við einum boðum, ið kundu skiljast sum ein hóttan ímóti manningini á flogfarinum.

Neyðlendingin gekk væl, men kanningarliðini funnu einki illgrunasamt umborð á flogfarinum.

American Airlines átti tvey av flogførunum, sum vórðu nýtt í yvirgangsatsókníni tann 11. september.

**(Fartekst)**



# Russarar eyðræna føroyska kongafiskin

**Nú rópa skiparar á djúpvatnstrolarunum aftur varskó. Russarar eyðræna føroyska kongafiskastovnin vestanfyri Mykines, og føroysku trolararnir eru kroystir burtur av teimum bestu leiðunum til kongafisk. – Setið eftirlitsmenn umborð á russisku trolararnar, tí tað er einasta loysnin, sigur Bjarki Berg, skipari**

EFTIRLIT
*Stefan í Skorini*



*Bjarki Berg fílist á, at russiskir svartkjaftatrolarar órógva fiskiskapin hjá teimum føroysku djúpvatnstrolarunum, ið royna eftir kongafiski, við tí úrsliti, at føroysku skipini mugu rýma*

Føroysku djúpvatnstrolararnir, ið royna á Mykinesgrunninum vestanfyri Føroyar, verða trokaðir burtur hesa tíðina á árinum.

Tað er nú um heystið, at russiskir trolarar, ið hava svartkjaftakvotu undir Føroyum, leggja leiðina á Mykinesgrunnin at royna eftir svartkjafti.

– Vit fáa heilt einfalt ikki fiska fyri teimum russisku trolarunum, tí teir eru so nógvir í tali, og teir forða føroysku trolarunum. Vit mugu flýggja av hesum leiðunum, meðan teir eru her, sigur Bjarki Berg, skipari á djúpvatnstrolaranum Brestir, ið fiskar kongafisk.

Sosialurin hevur fyrr gjørt vart við henda trupulleikan í samrøðu við Bjarka fyri hálvum ári síðani. Tó kenna skiparar og reiðarar seg framvegis kroystar. Tí verður málið tikið uppaftur.

### Ymiskir veiðihættir

Ein annar skipari, John Andrew Johannesen, ið siglir við Phoenix, vísir á, at trupulleikin er, at veiðihættirnir hjá teimum føroysku og russisku trolarunum eru ov ólíkir.

– Flótitrol og botntrol hóska heilt einfalt ikki saman. Russararnir fiska aftur og fram í hesum økinum. Vit mugu halda okkum til ávísar linjur í botninum og mugu tí mangan víkja fyri teimum. Tí órógva teir okkara fiskiskap so mikið, at vit ikki fáa verið har, sigur John Andrew Johannesen, ið tekur undir við Bjarka Berg.

Tað eru tvey tiltøk, ið skulu setast í verk fyri at koma hesum trupulleikanum til lívs. Tað fyrsta er fáa russisku trolararnar burtur av hesum leiðunum. Tað skal gerast við bara at geva teimum loyvi at fiska uttanfyri 380-400 favna dýpi. Á henda hátt fáa føroysku trolararnir frið at fiska.

Tað seinna er at seta eftirlitsmenn umborð á russisku skipini. Soleiðis kunnu myndugleikarnir tryggja sær, at russarar bara fiska svartkjaft, sum teir hava kvotu til undir Føroyum.

### Kongafiskurin verður oyddur

Skiparar og reiðarar bera ótta fyri, at kongafiskastovnurin vestanfyri Føroyar verður oyddur, nú russisku skipini eru so røsk at royna har.

– Fyri eini fýra árum síðani fingu føroyskir trolarar nógvan kongafisk eystanfyri Føroyar av Munkagrunninum og heilt norður á Fugloyarbanka. Henda leiðin er nú deyð fyri kongafisk, eftir at russiskir trolarar hava verið har við flótitroli, sigur Bjarki Berg.

Í dag eru eini átta føroyski djúpvatnstrolarar, ið royna vestanfyri Mykines. Teir eru Niels Pauli, Steintór, Suðringur, Phoenix, Rankin, Brestir, Rasmus Effersøe og Boðasteinur.

Álitið hjá hesum skipunum er leiðin á Mykinesgrunninum. Um teir ikki fáa frið at royna har, er grundarlagið í vanda. Breiða semja er um hetta málið millum menn á hesum bátunum.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur, at fiskiveiðueftirlitið setti eina umfatandi kanning í verk í ár fyri at kanna, um russarar fingu so nógvan kongafisk, sum Bjarki Berg og teir vilja vera við.

Kanningarnar av lastunum vístu, at russarar ikki fáa nógvan kongafisk, vísir Jørgen Niclasen á.

Bjarki Berg er tó ikki nøgdur við tær kanningar, ið eru gjørdar. Hann vísir á, at tær skulu gerast um náttina og ikki bara um dagin, sum vanligt er. Orsøkin er, at kongafiskurin svimur uppi í sjónum um náttina, og tá fáa russarar nógvan kongafisk við flótitrolum.

Hann heldur tað samstundis vera illgrunavert, at kongafiskurin hvarv eystanfyri, eftir at russarar høvdu verið í tí økinum, og at fiskiskapurin hjá teimum djúpvatnstrolarunum vestanfyri eisini er í stórari minking, nú russar eisini royna har.

Hann dregur samanum, at russisku trolararnir eru við til at oyða føroyska kongafiskastovnin. Myndugleikarnir skulu flyta russisku bátarnar út á djúpri sjógv, so føroysku bátarnir fáa frið at fiska, og haraftturat hevði tað verið eitt gott uppskot at seta eftirlitsmenn umborð á russisku bátarnar. Soleiðis hevði borið til at havt eitt nøktandi eftirlit við veiðuni.



*Trolarin Brestir fór leygardagin til fiskiskap vestanfyri Føroyar. Hesa tíðina á árinum verður skipið illa órógvað at russiskum skipum, so teir ikki fáa frið at fiska*

## Jørgen viðurkennir ikki trupulleikan

**Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum tekur ikki undir við at seta eftirlitsmenn umborð á fremmand skip undir Føroyum, tí hetta gevur ikki nakað úrslit. Hann vísir samstundis aftur, at russarar veiða ov nógvan kongafisk**

EFTIRLIT
*Stefan í Skorini*

Í øðrum londum er vanligt at hava eftirlitsmenn ella eygleiðarar umborð á fremmandum skipum fyri at hava tamarhald og eftirlit við veiðuni. Hetta er vanligt í Kanada, og Ísland hevur eisini nýtt eftirlitsmenn umborð á skipum.

Hesir eru umborð á skipum í fleiri vikur, og teir kunnu tí hava neyvt eftirlit við, hvørji fiskasløg skipið fær, og hvussu stór veiðan er.

Føroyar hava ongantíð nýtt henda háttin, og tað er heldur ikki líkt til, at tað fer at henda í bræði.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, tekur nevniliga ikki undir við at hava eftilitsmenn umborð á útlendskum skipum, ið royna undir Føroyum.

### Ov kostnaðarmikið

Skiparar á djúpvatnstrolarum hava annars skotið upp at seta eftirlitsmenn umborð á russiskar trolarar, tí teir hava illgruna um, at teir fáa ov nógvan kongafisk.

– Kanada hevur nýtt eftirlitsmenn nógv, men eg haldi ikki, at hetta er besti mátin at fyribyrgja ólógligari veiðu. Vit hava eitt fiskiveiðueftirlit, ið riggar væl og greiðir sína uppgávu. Hetta er nøktandi til at fyribyrgja ólógligari veiðu, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at skipanin við eftirlitsmonnum er kostnaðarmikil, og tí loysir tað seg ikki at fara undir eina slíka skipan. Tað er betri at taka royndir av og á av skipunum.

Jørgen Niclasen er heldur ikki nógv fyri at senda russisku bátarnar út á djúpri sjógv, men tað vil hann ikki taka støðu til uppá standandi fót.